**Heimarøktin og Serforsorgin**
Røktarheimið á Mørkini, 435 Streymnes

# Røktarheimið á Mørkini Søkir eftir heilsurøktarum og sjúkrarøktarfrøðingum

Røktarheimið á Mørkini er ein samskipaður partur av Heimarøktini Vágar/ Norðstreymoy.

Á Røktarheiminum á Mørkini eru 32 búpláss býtt út á 4 eindir við 8 búplássum á hvørjari eind. Til hvørja eind er felags køkur og stova. Búeindirnar eru sambundar av einum meginbygningi, ið umfatar meginkøkin, hølir til ergo- og fysioterapi og sal til felagstiltøk á heiminum. Aðalsetningurin fyri heimið er, skapa eitt so heimligt og livandi umhvørvi sum gjørligt.

Heimið opnaði í maj 2006 við 16 røktarheimsplássum og í løtuni eru vit í ferð við at taka síðstu eindirnar í brúk. Í hesum sambandinum sóknast vit eftir sjúkrarøktarfrøðingum og heilsurøktarum at arbeiða 0,7 tíð í blandaðum vaktum at byrja 1. oktober 2006 ella skjótast tilber.

**Vit søkja eftir fólki:**
- við røktarfakligum royndum
- hevur hug og hegni at samstarva við ymiskar fakbólkar
- hevur áhuga fyri at starvast innan elddrarøkt
- kennir gleði við at vera saman við gomlum fólki.

**Vit kunnu bjóða:**
- góðar arbeiðsumstøður í nýggjum heimi
- eitt spennandi og mennandi starv, har arbeitt verður tvørfakligt
- eitt starv við nógvum avbjóðingum
- eitt starv í einum øki, sum er í støðugari menning.

Størvini eru lønt eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi fakfelag.

Nærri fæst at vita um størvini við at venda sær til deildarleiðaran á Mørkini á telefon 505440.

**Umsókn:**
Umsókn við avriti av autorisatión, prógvi og møguligum viðmælum v.m. skal sendast til:

**Røktarheimið á Mørkini**
435 Streymnes

**Att: Annika Vágsheyg**

**Umsóknarfreist: 27. september 2006.**

Fiskimálaráðið

FISKIVINNU GRANSKING

# FISKIVINNUROYNDIR 2007

## LÝSING EFTIR UMSÓKNUM

Fiskivinnuroyndir er játtan hjá Fiskimálaráðnum, sum stuðlar gransking og menning innan fiskivinnu:

Verkætlanir innan fylgjandi høvuðsøki hava fyrimun:
- Fiskiskapur við ábyrgd
- Royndarveiða, framleiðsla og søla
- Virðisøking av fiski
- Búskaparlig og samfelagslig menning av fiskivinnuni
- Heilsa, trygd og umhvørvi

Innanfyri høvuðsøkini verður lagdur dentur á at fáa verkætlanir, sum kunnu:
- Lýsa og loysa praktiskar trupulleikar at fáa alla veiðu til høldar (fisk, livur, rogn innvølir vm.)

Serligur dentur verður lagdur á, at
- vinnan tekur lut í verkætlanini
- eginfígging ella onnur fígging er verulig
- samstarv er við samstarvsfelagar í Føroyum og/ella uttanlands.

Fyritøkur, almennir stovnar og einstaklingar kunnu søkja um stuðul úr Fiskivinnuroyndum.

Víst verður á, at møguleiki er hjá vinnuni at søkja um stuðul til setan av vinnugranskara innanfyri omanfyrinevndu økir.

Um tørvur er á at orða hugskot til ítøkiligar verkætlanir ber til at seta seg í samband við samskiparan um hetta.

Umsóknir skulu verða samskiparanum í fiskivinnugransking í hendi í seinasta lagi **mánadagin 16. okt. 2006 kl. 12.00.**

**Meira fæst at vita:**
Programm, umsóknarbløð, vegleiðingar og annað kunnandi tilfar fæst á heimasíðu okkara www.fvg.fo

Áhugaði eru vælkomin at venda sær til Jákup Mørkøre, samskipara við møguligum spurningum.

Fyrivarni verður tikið fyri játtan á løgtingsins fíggjarlóg fyri 2007.

Jákup Mørkøre, samskipari
tlf.: 35 30 30 / 35 32 48
fartel.: 21 73 69
t-post: jakupmo@fisk.fo

**Umsóknir skulu sendast til:**
Fiskimálaráðið
Samskiparin í fiskivinnugransking
P.O.Box 347, Heykavegur 6
FO-110 Tórshavn

Internet Sosialurin
www.sosialurin.fo